# Dagbókin - 10 a í Venjingarskúlanum í Havn

## Hósdagur 12. desember

Í morgun leitaði eg svøk eftir tí reyðu troyggjuni. Eg hevði koyrt hana til vask fyri 1 viku síðan, men mamma hevði SJÁLVANDI ikki vaskað hana. Hon er altíð so stressað!

Sum um eg ikki eri tað! Í dag skulu vit til roynd í føroyskum stíli. Heilt sikkurt bara keðilig evnir at velja í! Tá eg endiliga varð liðug, fóru eg og Sunneva niðan í SMS. Sjálvandi vóru Jón og Kristina har! Hon hugdi ordiliga yvirlegin eftir mær, men tá Símun setti seg hjá mær og Sunnevu, varð hon nokk so súr.

Tá eg kom heim, hevði eg sjálvandi gloymt at keypt inn fyri mammu. Hon varð ikki blíð, tí so mátti hon sjálv fara og taka lítlibeiggan við, sum bara græt. Og hon, sum er so stressað og bla, bla, bla.

Sunneva kundi ikki koma niðan, tí Høgni hevði biðið hana koma í biograf. Eg orki ikki fyri vinkonum, sum altíð velja sjeikin framum alt, sjálvt um hann hevur verið ordiliga keðiligur kvøldið fyri. Eg fór tíðliga í song!



## Fríggjadagur 13. desember

Royndirnar eru tíbetur lidnar og mamma hevði vaskað troyggjuna! Jubi! Um eina viku er jólafrí! Jubi! Vit hava bara hugnað okkum í skúlanum og vit sluppu tíðliga heim.

Eg og Sunneva fóru í býin at hyggja eftir klæðum. Mamma skuldi geva mær pengar til jólaklæðir og eg fann ein lekran kjóla og ein jakka. Sunneva keypti jólagávu til Jón - eitt hálsband.

Jón sendi mær eitt sms og spurdi hvat eg fór at gera seinni. Jubi! Eg svaraði ikki aftur beinanvegin, men so spurdi hann um eg kom oman til hann.! Eg svaraði bara "kanska", men eg fór aftaná náttturða! Hann segði ikki eitt orð um Kristinu og eg tímdi ikki at spyrja. Vit avtalaðu at fara á konsert í annaðkvøld! Sunneva verður sikkurt súr, tí Høgni tímir ongantíð á konsert við henni. Men tað má hon um!
Eg var annars næstan liðug at keypa jólagávur, men nú má eg eisini keypa til Jón :o) . Veit bara ikki hvat tað skal vera!








<ph_1>

**Tíðindablaðið Sosialurin**
Postsmoga 76
100 Tórshavn
Tlf. 31 18 20
Fax 31 47 20
Teldupostur: ph_1@sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller

**Blaðstjórn:**
Ingrid Bjarnastein
Solby Anna Eliasen

<ph_1> er ein partur av Sosialinum annanhvønn mikudag. Evstamark er á middegi fríggjadag

Lýsingar til <ph_1> skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin áðrenn blaðið kemur út.

Lýsingarnar skulu ikki vera størri enn 254 mm breiðar og 70 mm høgar.



**Heinta tíni egnu brúkarabúmerki ...**

... tey kunnu fáast við at senda fyrispurning beinleiðis gjøgnum fartelefonina á tel 1441 og viðmerkja TT logo [stuttboð] fyri Brúkarabúmerki, TT kort [stuttboð] fyri Myndaboð og TT ton [stuttboð] fyri Ringitónar.

Brúkarabúmerki: 18FOR, 16FOR, 15FOR, 14FOR, 1FOR, 10TEK, 13BIL, 12BIL, 11BIL, 10BIL, 1BIL, 8BIL, 1FIL, 7VOR, 1ITR, 1JOL, 16ITR, 6VOR, 1ANN, 26ITR

Myndaboð: 1TEK, 3ANN, 1VOR, 2ANN, 13KAR, 5SKE, 2FIT, 2ITR, 2KAR, 6DYR, 1BIL, 2TEK, 2TON, 2VOR, 3DYR, 3HEI, 3ITR, 3KAR, 2BIL, 3SKE

Ringitónar:

| | | | |
|---|---|---|---|
| B36 | 18FAR | My Heart Goes Boom | 9POP |
| Reytt svart | 17FAR | Last Christmas | 3JOL |
| Liðið tað eitur KÍ | 16FAR | YMCA | 8POP |
| Vit halda øll við NSÍ | 15FAR | Show me the meaning | 7POP |
| Her kemur GÍ | 14FAR | Pedda Post | 12FIL |
| Tjóð-sangurin | 3FAR | Yesterday | 2GAM |
| Ormurin Langi | 1FAR | Fugla-dansurin | 1GAM |
| Indiana Jones Theme | 15FIL | I'm a Survivor | 6POP |
| If I were a rich man | 14FIL | Uncle Fucker úr SouthPark | 11FIL |
| American Pie | 13FIL | Lost in Space | 10FIL |

planet.fo

FØROYA TELE
Skapið framtíðina saman við okkum




# Vangamyndin: Jens Marni Hansen



# satsar upp á útlandið








| | |
|---|---|
| **Navn:** | Jens Marni Hansen |
| **Aldur:** | 28 ár |
| **Starv:** | Maskinsmiður |
| **Yndisorð:** | Nina |
| **Føðingardagur:** | 18.12.1974 |
| **Hvat vildi tú verða, tá tú vart stórur, tá tú vart lítil?** | Rokk-stjørna |

**Kollfirðingurin Jens Marni Hansen, sum føroyingar flest kenna best úr bólkinum All That Rain, hevur havt ferð á innan tónleikin tað farna árið. Fyrr í ár luttók hann í talent kappingini hjá TV 2 Popstars og kláraði hann seg heilt væl. Hann hevur ongar ætlanir um at leggja tónleikin á hillina – heldur tvørturímóti**

Ongin ítøkilig ætlan liggur á borðinum beint nú, men Jens Marni sigur, at framtíðarætlaninar, hóast tær eru óvissar beint nú, eru at royna at fáa tónleikin fram uttanlanda. Hann ætlar sær at arbeiða við nøkrum løgum, sum hann so fer at royna at fáa fram uttanfyri landoddarnar.
- Um tað skal verða, so skal tað verða nú, sigur hann.

Hann vísir á at vera kendur í Føroyum, tað er ikki so stórt. Tað er so skjótt, at ein er komin runt í landinum, so vónin um at liva av tónleikinum í Føroyum, tær eru so at siga ongar. Og sum tónleikari er tað til tíðir eisini neyðugt at fáa onkran steðgin, so at ein kann fáa tíð til at hugsa um nýggj hugskot. Og tað kann gerast so nógv betur, tá ein ikki er noyddur at hava annað livibreyð við síðuna av tónleikinum. Tí tónleikur krevur nógva tíð.

- Fyri fyrst hevði eg kunnað hugsað mær at roynt meg í Danmark. Og so møguliga í Íslandi seinni, men sum sagt, tað er ikki nakað fastlagt.

Við síðuna av tónleikinum starvast Jens Marni sum maskinsmiður. Tað er neyðugt, tá ein ikki kann liva av tónleikinum, men tað er strævið at arbeiða alla vikuna og so eisini um vikuskiftið.

- Men eg havi fingið sera góðar sømdir frá mínum arbeiðsplássi, tað er púra vist. Annars er ikki vist, at hetta hevði kunnað borið til, heldur Jens Marni.

Jens Marni gjørdi annars vart við seg fyrr í ár í Danmark, tá hann luttók í Popstars. Hann greiðir frá, at hann upprunaliga ætlaði at royna seg í eini aðrari sending. Ein sum eitur Rock-idoler á TV 3, men hann var ov seinur at tekna seg, og so gjørdi hann av at melda seg til Popstars, hóast hann ikki sær seg sjálvan so popputan.

Jens Marni dylur ikki fyri, at hansara luttøka í Popstars hevur givið respons. Serliga hevur hann hoyrt frá føroyingum í Danmark, sum hava við tónleik at gera. Men eisini danir hava latið hoyrt frá sær.

## Upptikin allan desember

Jens Marni sigur, at so gott sum hvørt vikuskiftið allan desembur mánaða og langt inn í januar er "bookað" fyri langari tíð síðani. Jólaborðhald, dansir og veitslur eru á skránni allan mánaðan. Men tað hevur hann onki ímóti, tí honum dámar so ómetaliga væl at spæla og syngja.

Hann og Kim Hansen arbeiða nógv saman, og Jens Marni sigur, at hóast annar er meira til rokk og hin kanska eitt sindur nærri at poppinum, so hevur hetta samstarv eydnast avbera væl higartil.

- Vit líkjast nokk so nógv, Kim og eg, hóast alt, og tí haldi eg, at tað kann fara at verða sera spennandi, hvat kemur burtur úr okkara samstarvi.

Jens Marni byrjaði at spæla gittar sum 10 ára gamal. Hann var einans 13 ára gamal, tá hann stóð á palli fyri fyrstu ferð og spældi til dans. Tað var eina nýggjársaftan í bygdarhúsinum í Kollafirði. Men Jens Marni veit eisini at siga, at hann plagdi at hava framførslur í stovuni heima við hús sum fýra ára gamal, so ikki kann annað sigast enn, at Jens Marni hevur vitað frá ungum árum, hvat hann ætlaði sær.

- Eg droymdi jú um at verða rock-stjørna, tá eg var lítil, sigur Jens Marni, sum fer at halda jól í Kollafirði saman við gentuni og foreldrunum.